Ingeborg Vinther:

# Kortanei til lønarsteðg fyri skattalætta

**– Føroya Arbeiðarafelag kundi aldrin funnið uppá at góðtikið at lønarsteðgur verður settur í verk afturfyri eina avtalu um skattlætta, sigur Ingeborg Vinther**

LØNARSTEÐGUR OG SKATTALÆTTI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Eg havi ikki nevnt lønarsteðg við einum orðið: Tað sigur seg sjálvt, at lønarsteðgur kann ikki ikki koma uppá tal hjá verkafólki, sigur Ingeborg Vinther*

– Føroya Arbeiðarafelag fer aldrin at ganga við til at gera eina avtalu um, at lønirnar hjá verkafólki ikki skulu hækka meiri.

Tað sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sigur, at tað er ein stór misskiljing, eru tað fólk sum hava fingið fatan av, at Føroya Arbeiðarafelag tekur undir við, at lønin skal ikki hækka meiri, men at skatturin skal lækka afturfyri, so at keypiorkan hækkar.

– Eg havi ikki sagt eitt orð um lønarsteðg og eg góðtaki ikki lønarsteðg, sigur Ingeborg Vinther.

– Hvussu kunnu vit tosa um lønarsteðg. Tað eru so nógv viðurskifti, sum ávirka keypiorkuna hjá fólki, sum vit ikki hava tað minstu ávirkan á, og tí ber ikki til at tosa um lønarsteðg, leggur hon afturat.

– Eitt nú hækka vøruprísirnir í heilum, umframt barnaansing, sjúkrakassar, sjónvarp, útvarp og onnur gjøld, og tí kunnu vit undir ongum umstøðum binda okkum til at lønirnar ikki skulu hækka.

Hon sigur, at tað, sum hon hevur sagt, er, at Føroya Arbeiðarafelag kann umhugsa at tosa við politikarar um at lækka lønarkrøvini eitt sindur undir ávísum treytum.

– Men tað er als ikki tað sama sum lønarsteðgur.

Men skulu vit ganga við til at lækka lønarkrøvini eitt sindur, skulu vit hava eina eina 100% trygga avtalu um at skattur og avgjøld lækka, eitt nú mvg, oljuavgjaldið og onnur brúkaragjøld.

Hon leggur dent á, at skal talan yvirhøvur vera um at tosa um lønarsteðg í verk, er tað ein avgjørd fortreyt at príssteðgur eisini verður settur í verk.

Og tað sær hon sum eina ómøguliga uppgávu.

– Vit hava onki príseftirlit og sostatt stendur handilsfólki frítt fyri at áseta teir prísir, sum teir vilja, uttan nakað sum helst eftirlit og undir slíkum umstøðum fara vit ikki at tosa um príssteðg.

Hon minnist einaferð, at príssteðgur var í Føroyum. Tá var pápi hennara fakfelagsmaður og Petur Mohr Dam var løgmaður. Tá varð skipanin tann, at príssteðgur varð settur í gildið, men landið betalti handilsmonnum tað, teir mistu.

– Hetta varð ein so dýr skipan fyri landið, at politikarar tá á døgum gjørdu heilt greitt, at hetta fór aldrin at verða gjørt aftur.

Hon vísir eisini á, at hon hevur ikki serliga stórt álit á politikarunum.

– Men skulu vit yvirhøvur viðerða spurningin um at avmarka lønarkrøvini, skulu vit fyrst hava fulla trygd fyri, at skattur og avgjøld lækka so at keypiorkan hækkar, tí tað má hon.

Men hetta er framvegis ikki tað sama sum at seta lønarsteðg í verk.

### Mugu tosa saman

Men hon sigur eisini, at hetta er eitt so álvarsligt mál, at fakfeløgini mugu viðgera tað nógv meiri, áðrenn støða verður tikin. Samstundis má málið viðgerast nærri í Føroya Arbeiðarafelag, so vit kunnu gera støðuna upp innanhýsis fyri at vita, um hetta er nakað, sum vit yvirhøvur eru sinnað at taka upp, tí tað er slett ikki vist.

Og hon leggur eisini afturat, at hesin spurningurin kann í fyrsta lagi verða tikin upp við politikararnar eftir at eitt nýtt landsstyrið er skipað eftir valið.

# Gongur bara skeivan vegin hjá fiskivinnuni í Suðuroy

**At vit nú skulu noyðast at at gevast at arbeiða á miðdegi hósdagin er avgjørt eitt stig tann skeiva vegin, siga virkisleiðarar í Suðuroy**

ÚTFLUTNINGUR AV FISKI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– At Smyril framskundar fráferðina úr Suðuroy hósdagar, er eitt stórt bakkast fyri fiskavirkini, sum útflyta fesk fløk.

Tað eru virkisleiðarar í Suðuroy samdir um.

Bjarni Hansen, virkisleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri sigur, at umstøðurnar at virka feskan fisk í Suðuroy, eru nú so truplar, at Fiskavirking á Tvøroyri arbeiðir við at leggja framleiðsluna fyri ein stóran part, um til at útflyta fryst.

Magnus Jespersen, stjóri á Delta, sigur, at tað gongur bara skeivan vegin og at tað avgjørt er eitt bakkast, at virkini nú skulu noyðast at gevast at arbeiða á miðdegi hósdag. Hann sigur, at tað verður truplari og truplari hjá feskfiskavirkjunum at arbeiða.

### Kappingarførið versnar

Eisini Rógvi Reinert, stjóri á flakavirkinum í Hvalba, sigur, at hetta er avgjørt eitt stig tann skeiva vegin.

– Hetta ger, at framleiðslutíðin verður tað styttri. Onkur vildi kanska sagt, at tað ber til at heinta tað innaftur í hinum endanum og byrja eitt sindur fyrr. Men so koma vit inn í yvirtíð, sum er nógv dýrari fyri virkið.

– Alt í alt er hetta tískil eitt stórt afturstig fyri kappingarførið hjá virkjunum.

Hann hevur ikki kannað ferðaætlanina út í æsir, men skal hetta eisini føra við sær, at fiskurin kemur at liggja longri og bíða, er hetta eisini eitt afturstig fyri dygdina.

– Førir hetta, at fráferðirnar eru framskundaðar, ikki eisini við sær, at keypararnir fáa fiskin eitt sindur fyrr, verður fiskurin tað eldri og tað er ikki fremjandi fyri dygdina, sigur Rógvi Reinert.

# Aftur eitt bakkast fyri fiskivinnuna í Suðuroy

**Bæði Norrøna og Smyril broyta ferðaætlananina so at tað verður nógv truplari hjá fiskavirkjunum at arbeiða**

ÚTFLUTNINGUR AV FISKI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Smyril broytir nú fráferð úr Suðuroy hósdag, so tað verður enn truplari at arbeiða fisk í Suðuroy. Broytingin er ein avleiðing av, at Norrøna broytir sína ferðaætlan*

**Suðuroy:** Umstøðurnar hjá fiskivinnuni í Suðuroynni versna alsamt.

Og nú verður tað enn truplari hjá flakavirkjunum. Orsøkin er, at ferðaætlanin hjá Norrønu verður broytt fyri at fáa sína ferðaætlan at passa saman.

Og tá ið Norrøna broytir ferðaætlan, noyðist Smyril eisini at broyta ferðaætlan. Og tað er júst hósdagar, tá ið allur útflutningurin skal avstað, at ferðaætlanin verður broytt.

Higartil hevur Smyril siglt úr Suðuroy hósdagar klokkan 17.30.

Hetta er ein fiskivinnutúrur burturav, tí hendan túrin fer allur fiskurin, sum er virkaður í Suðuroy í vikuni, norður við Smyrli, so at hann kann fara av landinum við Norrønu.

Men nú verður hesin túrurin framskundaður í heilar teir tímar, so frá næsta hósdegi 15. januar at rokna, fer Smyril at silgla klokkan 15.30.

Hetta gevur fiskavirkjunum í Suðuroynni tveir tímar minni a arbeiða í.

Nógv av teimum, sum hava skil fyri fiskivinnuni hava sagt og skrivað, at besti máti hjá fiskivinnuni at yvirliva, helst í Suðuroy, er at leggja seg eftir at útflyta fesk fløk.

Men til tað krevst, at gott ferðasamband er niður á meginlandið, so at tað slepst av við fiskin.

Men tað, sum hendir er júst tað øvugta, at møguleikar at sleppa av við feskar fiskavørur alsamt versna.

Fyri nøkrum árum síðani sluppu virkini í Suðuroy av við fiskin fríggjadagar seinnapartar.

Men í 1996 varð Teistin seldur og tá helt beinleiðis skotlands siglingin hjá Strandferðsluni uppat.

Eftir tað fór Norrøna at flyta tann feska fiskin og síðani hevur Smyril verður noyddur at laga sína ferðaætlanin eftir Norrønu.

Í fyrstuni sigldi Smyril sostatt úr Suðury hóskvøld klokkan 19.Men síðani hevur Norrøna framskundað ferðaætlanina tvær ferðir og Smyril hevur verið noyddur at fylgt við.

Fyrst var fráferðin hjá Smyrli sostatt framskundað til kl. 17.30, sum hon er nú, men nú verður hon so aftur frasmskundað tveir tímar afturat, til klokkan 15.30.

### Høvdu onki val

Kristiani Davidsen, stjóri á Strandferðsluni sigur, at Strandferðslan hevði onki val.

– Smyril Line hevur boðað okkum frá, at fráferðin hjá Norrønu verður framskundað og flyta vit ikki fráferðina hjá Smyrli tveir tímar, sleppa suðuroyingar ikki av við við fiskin yvirhøvur og tað hevði verið ein ólukka fyri vinnulívið.

Men hann ásannar eisini, at tað er ivaleysa óheppið, at fráferðin verður flutt tveir tímar, tí hann veit, hvussu stóran týdning, nettupp hesin túrurin seinnapartar hósdagar hevur fyri suðuroyingar.

Tað, sum nú hendir, er, at frá 10. januar verður ferðaætlanin hjá Norrønu broytt, so at hon framyvir siglir av Havnini hóskvøld kl 20.30 ístaðin fyri kl 22.00, tvs, at fráferðin er framskundað hálvananan tíma.

Sostatt kemur Smyril hereftir at sigla soleiðis hósdagar seinnapart frá 15. januar at rokna:

Av Drelnesi hósdag kl 15.30 (ístaðin fyri kl 17.30)
Av Havnini hóskvøld kl 19.00 (ístaðin fyri kl 21.00)



# Fingu stóran skaða av fýrverki



*Hetta sær ikki so tespiligt út. 10 pentir í andlitið og brunasár. "Eg síggi…" rópti Kristian, tá ið hann kom fyri seg aftur*



*Ein harður umgangur. Tað er ikki gamansleikur at fáast við nýggju og kraftmiklu sløgini av fýrverki*



*Hondin á Tummasi sær ikki vøkur út. Tríggir brotnir fingrar og tvey brot á handliðinum*

**Í Rytuvík og Æðuvík fingu tveir ungir menn skaða av vandamiklum fýrverki, sum teir sendu upp nýggjársaftan. Annar drongurin fekk 10 pentur í andlitið; hin breyt hondina í fimm støðum. Báðir brendu seg, og heppið var, at teir ikki mistu eyguni**

FÝRVERK

Nýggjársaftan fingu tveir ungir menn, Kristian Olsen í Rytuvík (16) og Tummas Johannesen í Æðuvík (24), rættiligan skaða av fýrverki.

Hendingin í Rytuvík fór fram stutt fyri kl. 23 og hendingin í Æðuvík stutt fyri midnátt hetta kvøldið.

Báðir fingu teir skaða av sama slagi av fýrverki, har sonevndar tivolikúlur verða koyrdar niður í eitt rør. Eftir hvat Sosialurin hevur skilt, stóðust eisini aðrir skaðar av hesum fýrverki kring landið. Tað var eisini hetta slagið, sum tók lívið av einum dana nýggjársaftan.

### Í leysari luft

Mamma Kristian Olsen, Laura, var saman við øðrum á staðnum í Rytuvík, tá ið sonurin var fyri ógvusligu hendingini, sum kundi endað við eini rættiligari vanlukku.

Fýrverkið varð nýtt eftir forskriftunum, men eftir hvat skilst, kann hetta slagið av fýrverki vera rættiliga vandamikið.

Fjúsið, sum koyrt verður niður í rørið, er meira enn hálvan metur langt, men hvørki í Rytuvík ella Æðuvík sóu ungu menninir fjúsið nakrantíð brenna. Alt eksploderaði, og tá ið hetta fýrverk er rættiliga kraftmikið, er ikki gamansleikur at vera fyri kúlunum, sum koma upp úr rørinum. Fýrverkið eigur ikki at eksplodera, fyrr enn tað er komið langt upp í luftina.

Í Rytuvík hendi tað, at ein av hesum kúlum kom upp undir øsið á Kristiani, og so mikið stór var megin, at drongurin lyftist upp frá og datt afturav. Hann slerdi økslina í lendið aftanfyri og fekk rættiliga ilt.

Kristian fekk sjey pentur í kjálkan, tríggjar í høkuna og brendi seg annars í andlitið.

– Tað fyrsta, sonurin rópti eftir hendingina, var: "Eg síggi…!"

Laura sigur, at tey stúrdu fyri, at hann hevði mist annað eygað, tí alt eygað var bera krút, og eygnahár og eygnabrýr vórðu sviðin burtur.

### Breyt hondina

Hendingin í Æðuvík var ikki minni álvarslig enn hendingin í Rytuvík.

Sum skilst, tók Tummas hondina uppfyri, tá ið fýrverkið eksploderaði. Hetta kostaði honum tríggjar brotnar fingrar og tvey brot á handliðin. Haraftrat brendi Tummas seg í nøsina og pannuna. Kristian og Tummas komu á skaðastovuna á Landssjúkrahúsinum um nøkulunda somu tíð, men umframt kvinnuna, sum tók ímóti teimum, var bert ein lækni á vakt. Hetta merkti, at onnur, sum komin vóru at skaðastovuna við eitt nú børnum, ið høvdu fingið smærri brunasár og annað, noyddust at bíða, til teir báðir vóru viðgjørdir.

Laura sigur, at Kristian og Tummas vóru til viðgerðar á skaðastovuni samstundis, og Kristian lá á skaðastovuni í hálvan fjórða tíma.

– Sum vit skiltu, var eingin tilkallivakt hetta nýggjárskvøld, og tískil máttu einir fimm sjúklingar, sum komnir vóru á skaðastovuna, bíða rættiliga leingi, áðrenn teir sluppu fram at við børnum sínum.

Seinni hava Kristian og Tummas eisini hitst á Heilsumiðstøðini í Runavík, har teir hava verið til eftirkanningar og reinsingar. Tað er á Heilsumiðstøðini, myndirnar, sum vit prenta saman við hesi greinini, eru tiknar.

### Reyði Krossur

Laura heldur, at um ikki tilkallivakt var eina slíka nátt, so kundi eitthvørt annað verið gjørt, soleiðis at fólk fingu eina fyrstuhjálp.

– Tað eru fleiri, sum brúka samarittar hjá Reyða Krossi, tá ið ymisk tiltøk og stevnur eru. Hesir kosta einki. Tað hevði lætt um hjá teimum, sum bíðaðu, um onkur var at taka sær av teimum hesa náttina. Henda hjálp kundi verið veitt uttanfyri skaðastovuna – um ikki á sjálvari skaðastovuni. Onkur var, sum hevði smærri brunasár, og onkur var, sum bløddi. Slíkt kundi hond verið tikin um, heldur hon.

**vj**